tað mesta av forarbeiðinum til eina børsnotering. Tað vil so siga, at vit eru til reiðar at gera eitt prospekt, tá virðisbrævamarknaðurin kemur upp at koyra. Í øðrum førum eru tað ikki vit einsamallir, sum gera tað av. Standa vit t.d. við 20% av partapeninginum í einum felag, so nyttar okkum lítið at senda hetta á marknaðin, um tey 80% eru ímóti tí. Tað eru jú eigararnir, sum gera av, hvørt eitt felag verður skrásett ella ikki, og sum minnilutapartaeigarar mugu vit sjálvandi laga okkum eftir tí.

### Krevur tilvenjing

Spurdur, hvørt ein framtíðar notering á einum virðisbrævamarknaði kann hugsast at gerast ein treyt, tá verkætlanir framyvir verða lagdar fyri grunnin, sigur stjórin, at tað dugur hann illa at ímynda sær.

- Tað er jú ikki altíð, at tað er hóskandi til virkið. Hartil er tað eisini gjarna so, at um eitt virkið gongur væl, so verður tað neyvan nakar trupulleiki at sleppa av við okkara íløgu. Tað vil jú altíð vera ein spurningur um avkast.

- Og so má eg eisini siga, at hetta við virðisbrævamarknaðinum er nakað, sum kemur at taka tíð. Tað krevst ein umfatandi hugburðsbroyting til, og hon verður ikki gjørd frá degi til dags. Tað krevur sína tilvenjing, um føroysk virki til dømis skulu venja seg við tað gjøgnumkygni, sum eigur at vera á einum slíkum marknaði, so at rokna við nakrari kollvelting her og nú, haldi eg ikki vera rætt. Hinvegin er føroyska samfelagið somikið lítið, at tað eisini ber til at hava gjøgnumskygni, uttan at hetta beinleiðis skal vera á einum partabrævamarknaði, staðfestir stjórin fyri Framtaksgrunnin at enda.

ímóti. Fyrst og fremst, tí vit í løtuni ikki standa við nøkrum serligum peningatørvi.

Við einum gjaldførisluttfalli upp á 360, er helst eisini nakað um tosið hjá stjóranum, men tað hevur áður verið víst á, at skal felagið gera íløgur i nýggj flogfør, gerst talan helst um eina útreiðslu, sum er størri enn tað, sum felagið kann bera her og nú.

- Tað er sjálvandi rætt, men til ta tíð, tá hetta verður aktuelt, mugu vit so hyggja at, hvørjar møguleikar vit hava. Tað ber jú til bæði at leasa flogfør ella læna pening, og so er nýtekning av partapeningi sjálvandi eisini ein møguleiki. Men tað er so ein spurningur, sum vit ikki fáa tikið støðu til her og nú, staðfestir stjórin.

- Og spurningurin er eisini, í hvønn mun vit kundu drigið útlendskar investorar, um vit skuldu valt at gjørt sum eitt nú Faroe Petroleum. Teir eru í high-risk endanum av skalanum, har tað finnast fleiri investorar, sum hava ráð at satsa nakrar milliónir í eitt slíkt felag. Sjálvsagt við møguleikanum fyri jackpot, um t.d. ein stór oljukelda verður funnin. Hinvegin hava teir so eisini ráð at tapa, um allir brunnarnir vísa seg at vera tómir. Hjá okkum er vágin nakað minni, men úrtøkan er so eisini tilsvarandi lægri, og tá gerst talan helst um eina eins áhugaverda íløgu, tá talan er um eitt virki av okkara støðd.

### Treytir fylgja við

Og so heldur stjórin eisini, at tað umframt hetta eru onnur viðurskifti, sum í løtuni tala ímóti eini børsnotering.

- Skulu vit út, so kann motivið í løtuni helst bara vera tað, at vit vilja skaffa kapital. Men tú skalt so eisini minnast til, at tað eru forpliktilsir, sum fylgja við eini notering. Hartil er fyrireikingararbeiðið í eini børsnotering av slíkari støðd, at tað allar helst vil seinka tí arbeiðnum fram móti eini einsskiljing, sum nú er byrjað. Mín sannføring er í øllum førum, at ein einsskiljing má koma fyrst, og at tað síðani verður gjørt av, hvørt partabrøvini skulu skrásetast á einum marknaði ella ikki..

# Tørvur á vágafúsum kapitali



*- Útlendingar hava neyvan hug at gera íløgur í Føroyum, er arbeiðsmarknaðurin merktur av afturvendandi arbeiðssteðgum, vísir Bjarni Djurholm á.*

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, heldur, at óttin fyri útlendskum kapitali er ógrundaður**

VINNUPOLITIKKUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt av stóru kjakevnunum í samband við virðisbrævamarknaðin hevur verið atgongdin, sum útlendskir íleggjarar við hesum fáa til føroyskt vinnulív. Skulu vit framhaldandi politiskt syrgja fyri, at talan verður um fyritøkur, sum – í øllum førum meira enn hálvt – eru á føroyskum hondum, ella skal kapitalurin fáa frítt spæl. Eisini landafrøðiliga.

Stendur tað til landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm, so er hann ikki í iva um, hvat rættast er at gera í hesum.

Vinnumálaráðið hevur í løtuni ein arbeiðsbólk, sum endurskoðar vinnupolitikkin, og her tykist ein av niðurstøðunum vera, at forðingarnar hjá vinnulívinum mugu burturbeinast.

### Ógrundaður ótti

Enn vil Bjarni Djurholm ikki fara í smálutir viðvíkjandi arbeiðnum hjá bólkinum. Arbeiðið er enn bara ávegis, og áðrenn farið verður út til almenningin, ynskir hann at fáa konsensus fyri ætlaða politikkinum.

Men landsstýrismaðurin er av eini greiðari fatan, tá tosað verður um útlendskan kapital. Føroyingar eiga generelt at gera tað lokkandi fyri útlendingar at gera íløgur í Føroyum. Vinnuni tørvar vágafúsan kapital, sum hevur við sær millum annað vitan, sum kann stimbra framleiðnið - produktivitetin.

- Eg haldi, at óttin fyri útlendskum kapitali er ógrundaður, tá tað er lítið hugsandi at íleggjarar gera íløgur við tí endamáli at sjóða virksemið niður. tvørturímóti, staðfestir hann.

Víðari sigur hann, at til at røkka hesum máli eigur lógarverkið at verða lagað samsvarandi so at møguligar lógarfestar forðingar verða viðgjørdar og allarhelst avtiknar.

- Tí verður ikki bert hugt eftir vinnu-, skatta- og avgjaldspolitikkinum, men eisini eftir arbeiðsmarknaðinum. Útlendingar hava neyvan hug at gera íløgur í Føroyum, er arbeiðsmarknaðurin merktur av afturvendandi arbeiðssteðgum, vísir Bjarni Djurholm á.

Somuleiðis er støðan greið, tá talan er um leiklutin hjá tí almenna í vinnulívinum.

- Tíverri hevur tað verið trupult at fáa semju um einskiljingartilgongd, men nú tykist tíbetur vend at vera komin í, og er tað at frøast um. Uppgávan hjá tí almenna eigur sum megin-regla at vera at veita borgarum góðar tænastur og skapa greiðar og stabilar vinnukarmar, ikki at reka vinnu.

### Aðrar vinnur mugu vaksa

Bjarni Djurholm vísur á tølini hjá Hagstovuni fyri gjaldsjavnan. Uppgerðin vísir, at fiskaútflutningurin er um 62% av valutainntøkunum, meðan restin (38%) av inntøkunum til landið, stava frá ferðavinnuni, samferðslu, kt-vinna, lønir til føroyingar, sum arbeiða uttanlands og øðrum veitingum. Málið er at økja um tænastu/immateriellu inntøkurnar, og eru ábendingar eru um, at her er vøkstur, sigur Bjarni Djurholm.

Í sambandi við møguligar vakstrarmøguleikar vísir Bjarni Djurholm eisini á, at arbeiðsbólkur er settur at geva landsstýrismanninum frágreiðing um møguleikarnir fyri m.a. at stovnseta granskingarapark í Føroyum. Bæði í grannalondum okkara og aðrastaðni eru grankaraparkir og nýskapanarumhvørvi sett í verk.

- Hesi umhvørvi, har ið gransking og vinna eru sparringspartnarar, kunnu geva synergi og møguleika fyri spin-off fyritøkum og harvið nýggjum vitunartungum vinnum. Ein av fortreytunum fyri tílíkum nýskapanarumhvørvum er, at greitt býti er millum almennu uppgávurnar og virksemið hjá privatu íleggjarunum, sum seta í verk og fíggja kommersiellar verkætlanir, ið verða framdar á staðnum. Ætlandi skal arbeiðsbólkurin handa landsstýrismanninum frágreiðinga í mas mánaði, soleiðis at henda kann leggjast fyri landsstýrið í apríl mánaði.

- Uppskotið til nýggja vinnupolitikkin verður greinað í tveimum ritum, har tað fyrra fer at lýsa búskaparfrøðiliga grundarlagið undir vinnupolitikkinum, umframt at nýggi vinnupolitikkurin eisini verður orðaður í hesum riti. Í næsta ritinum verða so uppskot til virkisætlanir/handlingsstrategiir, sum fara at nágreina uppskot til politisk stig um lógarbroytingar og tillagingar annars. Seinna ritið verður sostatt at meta sum handbók við uppskotum til politiska myndugleikan at virka eftir, staðfestir Bjarni Djurholm, sum væntar, at fyrstu úrslitini av hesum fara at síggjast í lógaruppskotum eftir ólavsøku.